

## Nógv vápn í Noregi

Ta seinastu tíðina hava fleiri skottilburðir verið í Noregi, og nú vilja serfrøðingar hava politikararnar at herða reglurnar um vápn. Ragnhild Bjørnebekk, sum granskar umstøður í sambamndi við harðskap, sigur við kringvarpið NRK, at tað eru umleið 400.000 vápn í norskum heimum, sum ikki eru skrásett nakrastaðni. Í flestu førum er talan um veiðivápn. Ragnhild Bjørnebekk sigur, at tað er alt ov lætt at fáa fatur á vápnum í Noregi. Lógin er góð, men ikki nóg góð, og tað vísa tilburðirnir, sum vit hava havt í seinastuni, sigur hon við NRK.

## Jøkul hvørvur

Vísindafólk í suðuramerikanska landinum Bolivia siga, at ein tann best kendi jøkulin í landinum, Chacaltaya, er minkaður so nógv, at tað er lítið og einki eftir av honum. Vísindafólkinieru ikki í iva um, at tað eru veðurlagsbroytingarnar, sum eru orsøkin. Jøkulin er í 5.300 metra hædd og bleiv fyrr hildin at vera besta skíðstað í heiminum. Bolivisku vísindafólkini siga, at nú eru bara nakrir ísklumpar eftir uppi á tindinum, og tey vænta, at um eini seks ár er eingin ísur eftir. Kanningar fyrr vístu, at Chacaltaya-jøkulin er umleið 18.000 ára gamal.

# Jógvan á Lakjuni vil hava umbering

**Hann heldur, at Annika Olsen hevur onga virðing fyri honum og hann heldur, at hon skyldar honum og øðrum fólkafloksmonnum eina umbering**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg haldi, at landsstýriskvinann skyldar okkum eina umbering.

Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin, vil ikki góðtaka framferðina hjá Anniku Olsen, landsstýriskvinnan í innlendismálum – sum eisini er úr Fólkaflokkinum.

Tað er í málinum um at broyta revsilógina, at løgtingsmaðurin heldur, at partakvinnan í innlendismálaráðnum er farin út um mark.

Ja hann heldur enntá, at tað er ovboðið, soleiðis sum Anniku Olsen hevur borið seg at í hesum máli.

### 266-b í buktini

Nú ætlanin er at broyta revsilógina, hevur eisini verið ætlanin at herða tað illa umstríddu grein 266-b, har tað stendur, at tað er heldur ikki loyvt at happa og forfylgja fólki vegna teirra kynsliga tilknýti

Ætlanin hevur nú verið at skoyta upp í 266-b, at har happing og forfylging er ein liður í eini propaganda-átaki, skal revsingin herðast.

Jógvan á Lakjuni gjørdi vart við, at hetta kundi hann undir ongum umstøðum góðtaka, tí hann vildi ikki vita av 266-b yvirhøvur.

Hann visti heldur ikki av, at hetta var við í tí, sum landsstýriskvinnan legði fyri Løgtingið.

Kortini hevur rættarnevndin tikið herðingina í 266-b burtur úr og hevur tikið aðrar tilsipingar til hesa somu 266-b burturúr og tað takkaði Jógvan á Lakjuni fyri.

### Vil hava umbering

Men hann heldur framvegis, at framferðin hjá Anniku Olsen er ovboðin, tí hann følir seg lumpaðan av sínum egna floksfelaga og hann kunngjørdi á tingsins røðarapalli í gjár, hann helt, at landsstýriskvinnan skyldaði honum og fleiri øðrum, sum eru ímóti hesum, eina umbering.

- Landsstýriskvinnan umboðar fyrst og fremst samgonguna, men hon umboðar eisini sín egna flokk, sum er næstan 100% ímóti hesum, sum hon hevur lagt fyri Løgtingið.

### Stóra virðing

Annika Olsen staðfesti, at hon hevði stóra virðing fyri Jógvani á Lakjuni og hon virdi hansara sannføring í etiskum spurningum, hóast hon ikki altíð var samd og hon var heldur ikki samd í hesum føri.

Men hon tók kortini undir við, at umstríddu partarnir um at herða 266-b verður tikin burtur úr, tí hon helt, at tað var meiri umráðandi, at allar hinar broytingarnar í revsilógin verða samtyktar.

Men hetta sissaði als ikki Jógvan á Lakjuni.

- Eg haldi ikki, at Annika Olsen hevur nakra sum helst virðing fyri mær, staðfesti hann av tingsins røðarapalli

- Tað hevur hon prógvað við at leggja hetta uppskotið fram, uttan at tosa við meg, ella flokkin um tað frammanundan, legði hann afturat.

- Tað helt hann ikki var tekin um virðing, serliga tá ið hon visti, hvussu stóran týdning hetta hevur fyri hann og onnur í flokkinum

Kortini legði hann afturat, at nú herðingarnar í 266-b eru tiknar burtur úr, kann hann taka undir við hinum broytingunum í revsilógini.

Og soleiðis vórðu tær eisini samtyktar í Løgtinginum.



*Jógvan Á Lakjuni sigur, at Annika Olsen hevur prógvað, at hon hevur onga virðing fyri honum*

# Kortanei til at hjálpa fátækum kommunum

**Tinglimir í samgonguni eru hart ímóti at sanera skuld hjá teimum kommunum, sum er ringast fyri fíggjarliga**

KOMMUNUSKULD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað kemur ikki upp á tal, at landskassin fer at sanera skuld hjá teimum kommunum, sum eru ringast fyri fíggjarliga.

Tað staðfestu tinglimir í samgonguni í Løgtinginum í gjár.

Sostatt er greitt, at Jóannes Eidesgaard hevur ikki fulla undirtøku í samgonguni, tá ið hann fleiri ferðir hevur nevnt møguleikan fyri at sanera skuldina hjá teimum kommunum, sum eru mest skuldarbundnar.



*Bæði tinglimir úr samgonguni og úr andstøðuni vilja ikki hoyra talan um, at landskassin skal hjálpa teimum kommunum, sum eru mest skuldarbundnar*

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur meiri enn einaferð róð framundir, at samgongan eigur at viðgera trupulleikan hjá teimum kommunum, sum eru mest skuldarbundnar.

Hann hevur fleiri ferðir víst á, at landskassin hevur áður saneráð vinnulív fyri milliardir, men at hann hevði havt nógv betri samvitsku av at sanera skuld hjá teimum fátækastu kommununum, enn hann hevur havt av at sanera vinnulívið.

Hann hevur víst á, at tá ið vit tosa um kommunurnar, eru tað okkara egnu borgarar, tað snýr seg um og hann heldur eisini, at ávísar kommunur eru so tyngdar av skuld, at tær í veruleikanum ikki eru virkisførar.

Tí hevur hann róð framundir, at tað er ein trupulleiki, sum landskassin eigur at gera nakað við.

Serliga umráðandi heldur hann tað vera, nú tosað verður um at leggja ávís øki undir kommunurnar at umsita, tí summar kommunur eru so hart fyrispentar, at tað er ein spurningur um tær eru førar fyri at veita borgarunum eitt nøktandi tilboð.

### Mótstøða

Men tað eru ikki allir tinglimir í samgonguni, sum eru undir við hesum.

Bæði Heðin Zachariasen og Rodmundur Nielsen úr Fólkaflokkinum, hava gjørt púra greitt, at teir taka ikki undir við, at landskassin fer at sanera nakra kommunuskuld.

Í Løgtinginum í gjár gjørdi Rodmundur Nielsen púra greitt, at tað kemur ikki upp á tal at sanera kommunuskuld.

Og hann gjørdi somuleiðis greitt, at hetta er ein spurningur, sum als ikki er viðgjørdur í samgonguni.

Floksfelagi hansara, Heðin Zachariasen, var púra samdur og hann gjørdi eisini greitt, at tað verður ikki við hansara atkvøðu, at nøkur kommunuskuld verður saneráð.

Hann førdi fram, at tað eru kommunustýrislimirnir, ið hava ábyrgd av fíggjarligu viðurskiftunum hjá kommununi innanfyri teir karmar, sum lógin annars ásetir.

Men eisini tinglimur úr andstøðuna gjørdu vart við seg.

Annita á Fríðriksmørk helt, at hetta fer at eggja til ábyrgdarloysi og hon skilti ikki, hvussu nakar politikari kann tosa um at sanera kommunuskuld, samstundis sum fleiri fíggjarlig inntriv eru gjørd, sum raka teir veikastu bólkarnar í samfelagnum.

Hon helt eisini, at hetta er ein óheppin fráboðan at senda úr tinginum, tí tað, sum hetta í veruleikanum sigur kommunum kring landið, er, at tað ger onki at tær átaka sær skuld, tí tá ið hon er nóg stór, verður hon bara saneráð.